Ove Ritter – ein Harley freak

Harley Davidson er eitt motorsúkklumerki, nærum øll kenna. Vit hava eisini nakrar av slagnum í Føroyum

PLÚMM
Rógvi Borðoy

Tað er eitt serligt slag av fólki, sum koyrir Harley Davidson. Ein av teimum er Ove Ritter, sum ikki bert koyrir á motorsúkklunum, hann selur tær eisini.

Ove Ritter er ein vanligur maður um miðan aldur. Hann er snøgt ílatin, og hevur einki sum helst at gera við rokkararnar, ein annars kann seta í samband við Harley Davidson.

- Tað at koyra við einari Harley Davidson er ein lívsstílur, sigur hann.

Í bakgrundini hoyrast blues-rock tónar. The Emmeroys eiga tónarnar, eitt rættiligt motorsúkkluorkestur. Ove Ritter greiður frá, at ein Harley Davidson keypari gjarna er umleið 40 ára gamal. Hann hevur livað eitt vanligt lív, og hevur so sæð, at hann ikki hevur fingið tað burturúr lívinum, hann gjarna ynskti. Og so kemur tankin: Hatta havi eg aldrin roynt!

Børnini eru flogin úr reiðrinum

- Ein skiftir barnavognin út við eina Harley, sigur Ove Ritter. Hann byrjaði ikki at koyra motorsúkklu sjálvur fyrr enn í 1995, tá hann var hermaður í danska herinum í Kuveit. Har slapp hann at læna eina Harley Davidson í átta mánaðir, og so var eingin vegur aftur. Hann mátti bara eiga eina.

Tað er ungdómur, frælsi og náttúruupplivilsi at eiga eina Harley. Har er ein serlig glæma um eina Harley, sum ikki fæst aðrastaðni, sigur Ove Ritter væl nøgdur.

100 ára føðingardagurin hjá motorsúkklufelagnum verður ikki hátíðarhildin her í Føroyum, sigur Ove Ritter, men hann veit um tveir føroyingar, sum fara til Hamborg ein av hesum døgunum at vera við í einum stórum føðingardagshaldi.

Felagsskapur

Tá tú keypir eina Harley Davidson, keypir tú samstundis ein felagsskap, sigur Ove Ritter.

- Kassadamur, advokatar, djóralæknar, øll eru líka og felags, tá tey eiga eina Harley Davidson, greiðir Ove Ritter frá.

Hann sigur eisini frá, at áhugin fyri motorsúkklum í Føroyum er sera stórur í hesum døgum. Sum dømi tekur hann síðsta summar, tá hann hevði fýra súkklur í landinum, sum fólk kundu sleppa at royndarkoyra. 107 fólk koyrdu ein túr, og øllum dámdi sera væl túrin. Her eru 276 motorsúkklur í landinum, og 12 av teimum eru av merkinum Harley Davidson.

Bitin

Fólk, sum eru vorðin bitin av merkinum Harley Davidson, sleppa aldrin av aftur við áhugan. Ove Ritter sigur frá:

- Um tú hevur eina álvarsliga sjúku, so er í minsta lagi ein vón um at blíva grøddur. Men um tú eigur eina Harley, er eingin vón um at sleppa av við hana aftur, sigur Ove Ritter.

Á heimasíðuni hjá honum, www.hd.fo, kann ein lesa meir um motorsúkklurnar.

Søgan hjá Harley Davidson í stuttum

1903: Hin 21 ára gamli William S. Harley og 20 ára gamli Arthur Davidson byggja fyrstu Harley Davidson Motorsúkkluna. Teir byggja í einum skúri, sum er 3 x 5 metrar til støddar.

1907: Felagið Harley Davidson Motor Company gerst veruleiki tann 17. september. Nú eru 18 fólk í arbeiði.

1910: Harley Davidson merkið verður brúkt fyri fyrstu ferð.

1912: Byggingin av nýggju fabrikkini í seks hæddum byrjar.

1918: Amerikanski herurin gerst størsti kundin hjá Harley Davidson. Herurin keypir helvtina av bygdu motorsúkklunum hetta árið.

1920: Harley Davidson byggir meir motorsúkklur enn nøkur onnur fyritøka. Sama árið slær Leslie "Red" Parkhurst 23 ferðmet við einari Harley Davidson.

1929: 45 kubikktumma V-motorurin verður settur á D modellið. Fyri kennarar verður motorurin kallaður "Flathead".

1931: Allir kappingarneytar hjá Harley Davidson í USA eru burtur uttan Indian. Fram til 1953 eru hesar báðar einastu motorsúkklufyritøkur í landinum.

1937: Eitt nýtt heimsmet verður sett á einari Harley Davidson. Joe Petrali koyrir gott 136 mph.

1941: USA fer inn í Seinna Heimsbardaga, og nærum allar motorsúkklurnar hetta árið verða bygdar til amerikanska herin.

1957: "Sportster" sniðið sær dagsins ljós fyri fyrstu ferð.

1969: Harley Davidson leggur saman við American Machine and Foundry Company (AMF).

1973: Felagið flytur í nýggj høli, sum liggja í York. Høllin er 400.000 kvadratføtur til støddar.

1983: Klubbin Harley Owners Group (H.O.G) verður stovnaður. Klubbin er bert fyri eigarar av Harley Davidson motorsúkklum.

1993: 100.000 motorsúkklur koyra í einari konvoy fyri at hátíðarhalda 90 ára føðingardagin hjá Harley Davidson.

2003: Felagið fyllir 100 ár, og tað verður hátíðarhildið av Harley Davidson eigarum um allan heimin.

Harley Davidson 100 ár

100 ár eru liðin síðan fyrsta Harley Davidson motorsúkklan sá dagsins ljós

MEIRA PLÚMM
Rógvi Borðoy



Harley Davidson er ikki bert ein motorsúkkla. Hon er ein lívsstílur. Hon er ikki eitt akfar, hon er frælsi. Tað siga eigararnir í øllum førum.

Og so hevur hon 100 ár á baki í ár.

Hátíðarhald um allan heimin

Serliga er tað í stóru býunum í USA, at føðingardagurin verður hátíðarhildin, men eisini aðra staðni møtast eigararnir av Harley Davidson motorsúkklunum at halda føðingardagin.

Í eitt ár hevur eitt rullandi Harley Davidson savn koyrt runt á vegum á øllum jarðarknøttinum, og tað hevur verið væl vitjað.

Heim til Milwaukee

Í august í ár fara nógvir eigarar at koyra frá fýra býum í USA til býin Milwaukee í statinum Wisconsin, har stóra fyritøkan hevur høvuðsskrivstovu. Á heimasíðuni hjá Harley Davidson verður roknað við, at nógv fólk fara at gera túrin.

Frá 28. til 31. august verður so ein stór veitsla hildin í samband við føðingardagin.

Í Evropa eru stór tiltøk eisini. Bæði í Hamburg í Týsklandi og Barcelona í Spania eru stór motorsúkklutreff, har Harley Davidson eigarar savnast at hátíðarhalda 100 ára føðingardagin. Tveir føroyingar fara til Hamburg.

Tað er bíligari – og nógv skjótari at stoypa kantsteinar við hesi maskinum, sum kann spara Tórshavnar kommunu fleiri milliónir um árið

Mynd: Jens Kristian Vang

Eitt heldur undarligt akfar sást tann 10. juli koyra á Vegnum Langa í Havn

Skjótari og bíligari

VEGAGERÐ
Rógvi Borðoy

Tólið vísti seg at vera ein kantsteinsstoypari. Eitt tól, sum eftir øllum at døma kann spara kommununum milliónir av krónum um árið.

Tólið virkar við, at betong verður stoytt í eina balju ovast. Síðani fer betongið gjøgnum eitt maskinarí og kemur út í botninum av tólinum sum stoyptur, liðugur kantsteinur.

Hetta er ikki fyrstu ferð, tólið verður brúkt her í landinum. Allir kantarnir í undirsjóvartunlinum um Vestmannasund eru nevniliga gjørdir av hesum sama akfarinum. Har fingu NCC og Byggitek samband, og hava síðani samstarvað um at royna tólið aðrastaðni.

Stórar sparingar

Odd Røyland, konsulentur hjá NCC sigur, at har eru stórar mongdir av peningi at spara við at brúka hetta tólið í mun til at leggja vanligar kantsteinar. Odd Røyland sigur, at vanligur stoyptur kantsteinur kostar umleið 550 krónur fyri hvønn metur. Við hesum tólinum liggur prísurin um 130-150 krónur meturin. Odd Røyland sigur, at fyri hvønn kilometur av kantsteinum, man leggur, er ein sparing upp á í minsta lagi 350.000 krónur.

Ein stór sparing í tíð er eisini. Odd Røyland og Tummas Sørensen í Byggitek siga, at tað er umleið fimm ferðir skjótari at stoypa kantsteinarnar á staðnum. Sum dømi taka teir undirsjóvartunnilin, har teir stoyptu 1.000 metrar um dagin.

Menninir, sum arbeiða við maskinuni siga, at tá teir hava stoypt 1000 metrar av kantsteini í Havnini, fara teir á flogvøllin í Vágum, har teir í fyrstu syftu skulu stoypa ein kilometur. Seinni í heyst skulu 2.500 metrar aftrat stoypast.

Serligt tilfar

Odd Røyland heldur fram, at tilfarið má vera sera fast og tjúkt, so tað skal bera til at stoypa tað á staðnum. Uppskriftin liggur hjá NCC, og hon er samansett, soleiðis at steinurin ikki tekur skaða av salti og frosti.

Teir báðir norðmenninir, sum arbeiða við sjálvum tólinum, síggja ikki út til at hava eitt hart lív, samanborið við vanligt vegarbeiði. Kantsteinsstoyparin ger tað mesta av arbeiðnum, sær tað út til.

Hendan maskinan verður í dag brúkt í øllum Noregi, og um hesar royndirnar vera væleydnaðar, er tað líkt til, at hon eisini verður meir at síggja í Føroyum komandi árini.

Roknskaparfólk til Figgjardeildina

"Peningur skapar ongi hugskot. Tað eru hugskotini, sum skapa peningur".
NILS DANIELSEN

Starvsfólk til Figgjardeildina

I sambandi við at eitt av okkara starvsfólkum fer úr starvi, verður sókt eftir einum roknskaparfólki til okkara Figgjardeild at byrja 1. september ella skjótast gjørligt. Nýggja fólkið skal vera við í menningini av figgjarfyrisetingini og –stýringini av fyritøkuni.

I Figgjardeildini starvast 6 fólk, herav 2 búskaparfólingar. Føroya Tele brúkar Oracle Financials í sambandi við figgjarstýringina, herundir Discoverer og TM1 til rapportering og til mánaðarroknskapir. I samstarvi við hini starvsfólkini á Figgjardeildini verða uppgávurnar at vera við til at menna og avgreiða niðanfyristandandi:

- ársroknskap og árar tilsamanlaknskapir
- figgjarætlanir og uppfylging av teimum v.m.
- virksamleikaroknskapir
- viðlíkahald av ymsum gagnlagsbókum, herundir uppfylging av flagum
- skriviligar meinagongdir v.m.
- gar av ymsum rapportum í Discoverer v.m.
- ymser ad hoc uppgávur

VR kunnu bjóða eitt starv í einum menningarmiðvitandi og avbjóðandi umhvørvi.

Ferðalagsskoyti

Tann, sum setur/-ur verður, skal hava hollar royndir og ferðalag innan roknskapararbeiði frá fíkmandi starvum ella frá grannaskoðara. Tað er ein fyrimunur, men ikki eitt krav, at viðkomandi hevur útbúgving sum t.d. HD, HA ella fíkmandi. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi er fleksibul og hevur:

- kunnleika til figgjarstýringsskipanir
- góð samstarvsevni
- evni at arbeiða sjálvstøtugt

Lønin verður sambæt avtalu við ovarðandi yrkisfelag og samavsvarandi ferðalkum.

Ljósari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heine Joensen, figgjarstjóra, Tel 30 30 30 lokal 3287 ella á farsælefon 24 32 97.

Umsóknir við avritt av prógvum, meðalgum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 4. august 2003.

Umsóknir skulu sendast til:
Føroya Tele
Att.: Starvsfólkadeildin
Postamoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE